ARBEIÐSEFTIRLITIÐ
*Administration of Occupational Safety and Health*
Fútalág 1B  P.O.Box 1134  FO-110 Tórshavn  Faroe Islands
Tlf. +298 317811  Fax +298 314489  E-mail: info@arbeidseftirlit.fo

***Skrásetingar nr.:***

**R-C008-1**

# Reglugerð um upphálingarspøl v.m.

Sambært løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum, § 17, stk. 2, hevur Landsstýrið heimilað Arbeiðseftirlitinum at fyriseta hesa reglugerð:

## KAPITTUL 1.

### Økið, ið reglugerðin fevnir um.

**§1.** Reglugerðin fevnir yvir øll upphálingarspøl til bátar, vøruflyting v.m., bæði í almennari og privatari ogn. Reglugerðin umfatar ikki spøl til persónflyting, sum eru umfataði av kunngerð nr. 110 frá 29. oktober 1982 um lyftir, heysitól v.m.

## KAPITTUL 2.

### Vanlig fyriskipan.

**§2.** Spælið skal verða soleiðis gjørt, tilevnað, uppsett og fest, at nýtslan hevur so lítlan vanda við sær, sum í royndum gjørligt.

**Stk. 2.** Spælið skal hava haldgott skelti við navni á framleiðara, framleiðsluári, raðnummari og tað størst loyvdu last, ið spælið kann nýtast til.

**§ 3.** Tvørmátið av veirtrumluni, mátað í foyrubotninum, skal verða í minsta lagi 14 ferðir tvørmátið av tí veiri, ið nýttur verður. Fyri skivur í kastiblokkum v.m. kann loyvast, at hetta lutfallið verður minkað til  10.

**Stk. 2.** Veirurin skal verða stálveirur, ið hevur eina brotstyrki millum 1270 N/mm² (130 kg/mm²) og 1960 N/mm² (200 kgmm²). Veirurin skal verða soleiðis tilgjørdur, at tá drátt- og kreppávirkanin av størstu orku, spælið kann nýtast til, verða løgd saman, má hetta virðið ikki verða meira enn 3 av brotstyrkini, og í mesta lagi verða 440 N/mm² (45 kg/mm²).

***Lógarheimild:***
Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.

***Útgivið fyrstu ferð:*** **27. februar 1979**

***Seinastu broytingar:*** **1. mai 1994**

**Stk. 3.** Veirurin skal tíðum kannast og skal skiftast út, tá hann er rustaður, hevur fingið pinnar, og annars hevur fingið mein av einum hvørjum slag. Øll eygu í stroppum og veiri skulu hava kós, og

eyguni skulu antin spleisast ella eisini kunna góðkendar veirklemmur og patentlás nýtast.

**Stk. 4**. Fyri at verja veirin móti rusti kann loyvast, at niðasti parturin (við krókin), sum kemur í sjógv, er góðkend stálketa, sum í minsta lagi hevur somu styrki sum veirurin.

**Stk. 5.** Krókurin í kastiblokki skal verða av slagnum "safety hook", t.v.s. við fjaðraávirkaðum pali ella líknandi, soleiðis at krókurin verður sum eitt eyga.

**Stk. 6.** Krókurin til at festa í barðholið á bátum v.m. skal verða úr smíðaðum stáli og herdur.

**Stk. 7.** Veirtrumlan, koblingar og annars alt, ið melur, skal verða skermað.

## KAPITTUL 3.

### Verndartiltøk og elektrisk útgerð.

**§ 4.** Spælið skal hava eina verndarútgerð, ið trygt steðgar spælinum, um onkur kemur fastur í veirin.
Hendan útgerð kann antin verða gjørd, sum ein hongslaður skermur um trumluna - sí strikumynd - ella sum ein hongslaður verndarboyli frammanfyri trumluna, sum veirurin gongur ígjøgnum. (Strikumyndin vísir bert eina grundreglu fyri, hvussu eitt sjálvvirkandi verndartiltak kann skipast. Skermar fyri endarnar av trumluni eru ikki vístir her)

Uppskot til avskerming av el-riknum bátaspølum




Tann leysi endin á veirinum skal liggja oman á

Hongslaður skermur

Max 40 mm

Trygdarkontakt - ávirkar nullspennings-frafallið, so spælið steðgar.
Legg til merkis, at spælið steðgar, tá stýrirullan verður trýst inn.

Sektorur, fastgjørdur til skermin, ávirkar kontakt so spælið steðgar, tá skermurin opnar.

Stýrirulla á kontakt

**Stk. 2.** Um nakað er áfatt og kemur ímóti hesi útgerð, skal skermurin, ávikavist boylin, ávirka eina kontakt, ið steðgar spælinum. Legg til merkis, at kontaktin skal verða soleiðis innrættað, at

hon brýtur streymin, tá hon verður trýst inn.

**Stk. 3.** Um spælið við kastiblokkum verður brúkt til fleiri neyst, skulu tiltøk gerast í hesum neystum, ið forða fyri, at nakar kann koma fastur í kastiblokkarnar og má báturin ikki kunna dragast nærri enn 0,5 metur fram móti neystavegginum. Hetta kann t.d. gerast við fotosellum, ið ávirka kontaktina til spælið.

**Stk. 4.** Onnur tiltøk, ið minst lúka omanfyri nevndu treytir, tekur Arbeiðseftirlitið støðu til í teimum ávísu føri.

**§ 5.** Stýrikontaktin skal verða nullsøkjandi, soleiðis at spælið bert koyrir so leingi kontaktin er ávirkað. Kontaktin skal týðuliga verða merkt "HIVA" og "LORA".

**Stk. 2.** El-innleggingin og elektrisku lutirnir skulu lúka treytirnar í sterkstreymsreglugerðini, sum el-nevndin umsitur, og sum SEV hevur eftirlit við.

## KAPITTUL 4.

### Fráboðanarskylda, sýn og brúksloyvi v.m.

**§ 6.** Á eitt serligt fráboðanarskjal, ið fæst frá Arbeiðseftirlitinum, skal framleiðarin vátta, at spælið er trygdarliga tilgjørt og lýkur tær treytir, ið givnar eru í kapittul 2 og 3.

**Stk. 2.** Uppsetarin skal á sama skjal vátta, at spælið er trygdarliga sett upp, og at verndarútgerðin virkar sum ætlað.

**Stk. 3.** Eigarin ella tann, ið ábyrgdina hevur av nýtsluni, hevur skyldu til, at vissa seg um, at spælið lýkur galdandi fyriskipan og skal senda fráboðanarskjalið í undirskrivaðum líki til Arbeiðseftirlitið.

**Stk. 4.** Arbeiðseftirlitið skal sýna og royna spælið, áðrenn hetta verður tikið í nýtslu. Brúksloyvi verður givið skrivliga av Arbeiðseftirlitinum, aftaná at spælið er sýnað og roynt á uppsetanar-staðnum, og skal her viðmerkjast, hvussu leingi brúksloyvi er galdandi.

**Stk. 5.** Fyri tíðarásett sýn og royndir, Arbeiðseftirlitið ger í samband við upphálingarspøl v.m., skal eigarin ella tann, ið hevur ábyrgdina av nýtsluni, lata eitt gjald, ið er ásett av Landsstýrinum.

**Stk. 6.** Upphálingarspøl skulu sýnast og roynast annað hvørt álmanakkaár, við í mesta lagi 26 mánaðars millumbili. Arbeiðseftirlitið kann krevja oftari sýn og royndir, um umstøðurnar tala fyri hesum.

**Stk. 7.** Arbeiðseftirlitið ásetur tíðina fyri sýn og roynd og boðar eigaranum ella brúkaranum frá hesum í minsta lagi 14 dagar frammanundan. Eigarin ella hann, ið hevur ábyrgdina av nýtsluni hevur skyldu til stundisliga og fyri egnu rokning at fremja tey neyðugu tiltøk, fyri at sýn og roynd kann fremjast og lata hjálp eftir tørvi hertil.

**Stk. 8.** Arbeiðseftirlitinum er heimilað til eina hvørja tíð at fremja ófráboðað eftirlitsarbeiði í samband við upphálingarspøl m.v.

## KAPITTUL 5.

**Gildi fyri reglugerðina.**

**§ 7.** Hendan reglugerð kemur í gildi 1. mai 1994. Samstundis fer úr gildi Reglugerð nr. C003/2 frá 27. februar 1979 um elektrisk drivin upphálingarspøl til bátar.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ,** hin 5. apríl 1994.

Eli Davidsen, stjóri (sign.)